

# Aftur í framtíðina

**Tey komandi trý leygarkvøldini fer Tv3 at vísa teir heimskendu Back to The Future filmarnar. Høvuðsleiklutin í hesum sera undirhaldandi framtíðarfilmi hevur Michael J. Fox, sum eisini dagliga hevur verið at sæð á Tvdanmark2 rásini í skemtirøðini Spin City.**

### Michael J. Fox

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Michael Andrew Fox |
| **Leiknavn:** | Michael J. Fox |
| **Føddur:** | 9. juni, 1961 |
| **Giftur:** | 17. july, 1988 við Tracy Pollan |
| **Familja:** | Fýra børn |

Leiklut í kendum filmum:
-Back to the Future I, II, III(´85, ´89, ´90)
-Casualties of War (´89)
-The Hard Way (´91)
-Doc Hollywood (´91)
-American President (´95)
-Mars Attacks! (´96)
-Atlantis, The Lost Empire (´01)
-Interstate 60 (´02)

Filmarnir snúgva seg um ein ungan mann, Marty McFly, sum ferðast aftur og fram í tíðini. Í "Aftur í framtíðina I" verður hann í 1985, sendur sendur aftur í tíðina. Hann kemur aftur í 1955, til tann sama býin, har hann er sjálvur er frá. Her møtir hann sínum foreldrum, sum hann í 1955 er javngamal við. Tað er her at stóri trupulleikin í filminum stavar frá. Hann kemur í vegin fyri tíðarinnar gongd og broytir hendingarnar, ið hava avgerandi týdning fyri framtíðina. T.d. tá hann presenterar pápa sín, George McFly, fyri mammu sínari, Lorraine Baines. Lorraine forelskar seg í Marty, sostatt er vandi fyri, at George og Lorraine ikki koma saman og ikki gerast foreldur at Martin, sum so heldur ikki verður føddur! Hetta má hann so stríðast fyri at fáa í rætt lag aftur, og tað at pápi hansara fyri tað mesta er ein sera afturhaldin tanáringur ger tað ikki lættari

Besti vinurin hjá Marty McFly er tann hálvsvakliga uppfinnarin Dr. Emmett Brown (Christopher Lloyd), sum í 1985 júst hevur framleitt eina tíðarmaskinu - ein Delorean, ið koyrir á plutonium. Men, sum so ofta við søgum um ferðing í tíð, so er okkurt galið við tíðarmaskinuni og hetta ger, at Marty er noyddur at steðga longri í 1955, enn neyðugt er. Filmurin sigur frá lívinum í einum amerikanskum býi í 50´unum og 80´unum og er ein væl samansettur filmur, ið skemtiliga spælir við mununum millum hesi tíðarskeiðini.

**Michael J. Fox**
Michael J. Fox hevur høvuðsleiklutin, sum tanáringurin Marty McFly. Undir upptøkunum til filmin hevði hesin úr at gera. Tá leikti hann samstundis við í sjónvarpsrøðini "Family Ties", sum gekk á amerikansku Fox-rásini. Hetta kravdi sera nógva tíð og orka av tí einans 24 ára gamla sjónleikaranum. Herav kom hendan ørliga arbeiðstíðin: Frá klokkan tíggju á morgni til klokkan 18.00, venjing og upptøka við "Family Ties", og frá 18.00 til 02.30 um náttina, upptøkur við "Back to the Future". Hetta stóð á í tveir samfullar mánaðir.

Hetta var ein øgilig skrá, men mennirnir aftanfyri filmin, Steven Spielberg og Robert Zemeckis, vóru vísir í, at hetta var ein stórfilmur, ið var verdur stríðið. Og hyggjararnir vóru púra samdir í hesum. Tá filmurin kom út, 4. juli í 1985 bleiv Michael J. Fox ein altjóða filmstjørna. Filmurin lá sum nummar eitt í fleiri vikur og vann 300 milliónir dollarar, hetta varð tá mett at vera ein stórfingin upphædd í filmsvinnuni.

Í 1998 almannakunngjørdi Michael J. Fox í tíðarritinum "People", at hann hevði Parkinson sjúkuna. Í 2000 fór hann frá væl dámdu skemtirøðini "Spin City", har hann hevði havt høvuðsleiklutin síðan 1996, nú skuldi hann vera meiri saman við familjuni og stuðla arbeiðinum fyri at finna heilivág fyri Parkinson sjúkuni. Eftir hetta hevur hann tó nakraferðir verið gestaleikari á "Spin City". Í mei 2000 stovnar hann "The Michael J. Fox Foundation for Parkinson´s Research" (www.michaeljfox.org), hetta er ein stuðulsstovnur, ið hevur til endamáls at virka fyri, at mann finnir heilivág fyri Parkinson sjúkuni, áðrenn 2010.

**Back to the Future IV?**
Hetta summarið hevur slaturið gingið um, at ein nummar IV-filmur av "Back to the Future" skuldi koma í sambandið við eina serliga DVD útgávuna av filmunum. Men ífylgi Steven Clark, ið skrivar á www.BTTF.com, er tað als ikki óvanligt við slíkum leysasøgum. Steven Spielberg hava eisini avsannað nakran møguligan eftirfylgjara. Við tíðarritið SCI FI WIRE sigur Spielberg, at eftirfylgjarar eru einans viðkomandi til "Indiana Jones" og "Jurassic Park" røðina. Upptøkurnar av "Indiana Jones IV" verða ikki fyrr enn í mei 2004, og filmurin kemur ikki út fyrr enn í 2005.














VARPIÐ